# Frálík útferð við Høgna til Gásadals



*Ferðaleiðarin, Høgni, greiðir frá, hvussu vit skulu fyrihalda okkum á ferðini til Gásadals.*

ÚTFERÐ

*Orð og myndir: Vilmund Jacobsen*

Ein útferðartúrur í Vágarnar við gongutúri til eitt nú Gásadals ella bátsferð í Tindhólm, er avgjørt ein ferð, ið kann viðmælast einum og hvørjum arbeiðsplássi, bólki, bindiklubba, familjum ella einstaklingum, sum kundu hugsað sær at gjørt eina slíka ferð, nú áðrenn summarfrítíðin byrjar, og fólk fara í ymiskar ættir.

Tíðliga seinasta summar var starvsfólkið á Sosialinum og tey hjá Hestprenti, sum gera tekniska arbeiði fyri Sosialin, á útferð í Vágunum. Tá bar leiðin niðan á Egg, har tú kundi njóta frálíka útsýnið yvir hábærsligar drangar og steyrrætt berg.

Eftir hugnaliga gongutúrin í besta veðri saman við ferðaleiðaranum, Høgna, fóru vit eftir lítla hvíld og gott brúsubað til kalt borð á hotellinum. Á kalda borðinum var bæði heitur og kaldur matur, og tú saknaði einki. Við borðhaldið var undirhald, og tá ið fólk vóru mett og væl sett, kundu tey fara inn í kømrini at hugna sær, til dansurin byrjaði.

### Í Gásadali

Seinasta leygardag var starvsfólkið á Sosialinum og Hestprenti aftur "fit for fight" til ein nýggjan túr í Vágarnar.

Vit fóru úr Havn við bussi um middagin, og klokkan 14 seinnapartin byrjaði ferðin av Hotel Vágum.

Eitt lítið lot hevði verið um morgunin, og okkurt ælið. Tó ikki so, at tað bilti, tí ælini vóru stokkut og fóru skjótt fram við.

Stutt vestanfyri tunnilsmunnan til Gásadals steðgaði bussurin, og eftir nakrar leiðbeiningar frá ferðaleiðaranum, sum aftur hesaferð var Høgni, fóru vit til gongu niðan brekkuna.

Tað tekur umleið hálvan annan tíma at ganga til Gásadals við vanligari gongd, men í ferðalagi gongur tíðin skjótt, tá ið fjasað verður um alt millum himmal og jørð á ferðini.

Eitt sindur tungt er at koma niðan brekkuna, um gingið verður ov skjótt, men hendan dagin høvdu vit góðar stundir.

Vit steðgaðu á viðhvørt, tá ið Høgni hevði eitt hvørt at siga frá, men veruliga kaffisteðgin tóku vit ikki, fyrr enn vit sóu omanyvir bygdina í Gásadali.

Á ferðini greiddi Høgni eitt nú frá Líksteini og Kelduni Vívd, sum bæði hava sína søgu.

### Tunnilin

Tað eru tey, sum siga, at tað er brattlendi oman til Gásadals. Hetta heldur kanska onkrum aftur í at fara túrin. Men her er einki brattlendi at tosa um og øll, sum eru hampiliga væl gongd, kunnu ganga hendan túrin. Gøtan oman er góð, men tú skalt ansa eftir, at tú ikki glíður í leysa tilfarinum av smásteinum og eyri.

Komin oman til Gásadals, steðgaðu vit eina løtu í bygdini og prátaðu við fólk, sum vóru stødd í Gásadali hendan dagin.

Onkur bjóðaði inn til kaffi, men vit tóku ikki av, tí vit vóru so mong í ferðalagnum.

Vit gingu heimaftur gjøgnum tunnilin. Hetta var ein øðrvisi túrur, tí myrkt var at ganga. Tað er nú ikki so ofta, at tú gongur úti í føroysku náttúruni – á alljósum degi – í myrkri!

Gongutúrurin gjøgnum tunnilin tók 18 minuttir.

Um kvøldið var aftur frálíka gott kalt borð á Hotel Vágum við undirhaldi og dansi aftaná.



*Útsýnið er vakurt, her vit eru komin niðan til varðan við skeltinum, Gásadalsbrekkan.*



*Kaffisteðgur! - og nú fer at hella omaneftir, tá ið vit fara til gongu aftur.*



*Høgni bjóðar kaffi og skuffukaku… tað letur Ann ikki á sær sita*



*Í Gásadali. Prátað verður við fólk, sum eru komin til bygdina at vitja í nakrar dagar*



# Útbrent

**Summir av bussunum hjá Bygdaleiðum eru nú givnir at koyra, tí eingin olja er eftir. Strandfaraskipini sigla tó framvegis, tí tey hava fingið undantaksloyvi frá arbeiðarafeløgunum til bæði at bunkra og proviantera**

VERKFALL

*Edvard Joensen*



*Bussarnir í Norðoyggjum eru settir og førararnir farnir úr teimum*

Bygdaleiðir, sum koyra í Eysturoy og Norðoyggjum eru steðgaðar. Orsøkin er stutt og greitt, at einki brennievni er eftir, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari á Strandfaraskipum Landsins.

– Leið 400 koyrir langt og brúkar tí nógv brennievni. Og einki stað er at bunkra uttan á støðunum fram við rutuni, og tær eru tómar. Sostatt gerst einki annað enn at seta bussarnar, sigur hann.

Í Klaksvík verða oljugoymslurnar blokeraðar, so einki verður koyrt út haðani. Sostatt er sama skilið har, og bussarnir standa.

Hvussu leingi hinar leiðirnar fara t koyra, veit Poul Jákup Thomsen ikki at siga, men vísir til arbeið-arafeløgini.

Tað hevur undrað fólk, at bussarnir nú verða settir, meðan strandfaraskipini halda fram við at sigla. Ikki bara tað, at tey fáa brennievni. Tey poviantera eisini sum vanligt, vísa fólk, sum hava vent sær til Sosialin, á.

Hví so er, hevur Poul Jákup Thomsen ikki rættiliga hug at útgreina, men vísir aftur til arbeiðarafeløgini. Tað sama sigur hann um spurningin, hvussu leingi skipini sleppa at halda fram.

Monrad Kjælnes, skrivari hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur, at frá byrjan varð gjørt av, at strandfaraskipini skuldu sleppa undan verkfallinum í tann mun, at tey bara sleppa at flyta ferðafók. Farmur má ikki flytast við teimum. Hendir tað, verða tey løgd við brestin.

At tey bunkra og proviantera sum vanligt, er ikki heilt rætt kortini, hóast tey gera tað. Tað verður nevniliga gjørt undir eftirliti, sigur skrivarin hjá Havnar Arbeiðsmannfelag. Fólk frá feløgunum er við, tá teir proviantera, fyri at tryggja sær, at teir ikki taka annað enn tað, sum brúk er fyri, umborð.

At bussar og strandfaraskip fáa hvør sína viðgerð, kemst av, sigur Monrad Kjælnes, at tey, hóast uppgávurnar líkjast í ávísan mun, kortini hava ógvuliga ymiskar uppgávur. Skipini flyta fólk um firðir og sund, har ikki landfast er. Tey, sum nýta bussarnar, hava hóast alt møguleika at ferðast á annan hátt, sigur hann.

Heldur ikki flúgvingin hjá tyrluni er steðgað, sigur arbeiðsmannfelagsskrivarin. Tyrlan flýgur til útoyggjarnar, og har er sama skipan sum við skipunum galdandi.



*Tey, sum skulu um firðir og sund, eitt nú við Másanum, hava bara skipini og tyrluna at líta á, og tey hava so fingið undantaksloyvi at sigla, hóast verkfall er*





# Beatles tiltak hóast verkfall

**Stóra Beatlees tiltakið, sum FS Vágar-stuðlar skipa fyri á Giljanesi leygarkvøldið, verður ikki ávirkað av verkfallinum, siga fyrireikararnir**

TÓNLEIKATILTAK

*Edvard Joensen*

**Vágar:** Størsta Beatles tiltakið í Føroyum nakrantíð verður sum ætlað á Giljanesi leygarkvøldið, hóast verkfall er.

Bólkarnir, sum fara at luttaka við løgum hjá Beatlunum hava vant eina tíð til hetta stóra tiltakið. Umframt verður so eisini plátuvendari, sum fer at leggja sololøg hjá teimum ymsu Beatlunum á spælaran.

Tey trý orkestrini hava lagt neyva skrá, sum spælt fer at verða eftir, eftir sum løgini eru vorðin til.

Fyrstir verða teir, sum nevna seg Ják' upsa skegg, við løgum sum I Saw Her Standing There, Eight Days A Week, Yesterday, Help, A Hard Days Night, I Want To Hold Your Hand og eini rúgvu afturat.

Síðan er tað All That Rain, sum fara at spæla ikki minni kend Beatlesløg. Teirra millum eru løg sum Yellow Submarine, Nowhere Man, Run For Your Life, Sgt. Pepper's Lonely Hearts Club Band og nógv onnur.

Seinastir eru Showmen, sum taka tey nýggjastu Beatlesløgini. Teirra millum finnast Hello, Goodbye, eins og Penny Lane, Let It Be, Ob-la-di, Ob-la-da, Back In USSR og ikki at gloyma Hey Jude.

Titakið byrjar klokkan 23.00 leygarkvøldið og endar sunnumorgunin klokkan hálvgum fýra við felagssangi, har sungið verður All You Need Is Love.

# Mykinesleiðin útboðin

**Siglingin millum Sørvág og Mykines er latin privatum felag at røkja. Sáttmálin er galdandi fyri eitt ár í fyrsta umfari**

STRANDFERÐSLA

*Edvard Joensen*

Vágar: Mykinesleiðin er boðin út, og eitt privat felag í Vestmanna hevur fingið siglingina.

Tað verður framvegis Súlan, sum í summar fer at sigla út í Mykines. Men tað eru ikki Strandfaraskip Landsins, sum fara at gera skipið út. Tað er felagið Sea Service hjá Palla Lamhauge í Vestmanna, sum stendur fyri siglingini í summar.

Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari á Strandfaraskipum Landsins, sigur, at tá boðið varð út, hevði felagið í Vestmanna lægsta boðið, sum so tikið varð av.

*Í Summar verður tað framvegis Súlan, sum fer at liggja við lendingina í Mykinesi. Men arbeitt veður við at finna annað, størri og skjótari skip til leiðina, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutnings leiðari á Strandfaraski pum Landsins*



Sáttmálin, sum gjørdur er við Sea Service, er bara galdandi fyri summarsiglingina í ár.

Tað kemst av, sigur Poul Jákup Thomsen, at Skipaeftirlitið arbeiðir við at gera reglur fyri ferðafólkaflutning við glastrevjabátum og -skipum. Men tað er líkt til, at tað dregur eitt sindur út, og tí er hendan avtalan so gjørd fyri siglingina í summar.

Tað er ikki vist, at tað verður Súlan, sum fer at sigla út í Mykines eitt annað ár, greiðir Poul Jákup Thomsen frá. Arbeitt verður við at finna eitt størri skip, sum eisini gongur skjótari enn Súlan, sigur hann.

Tað kemur meira enn so fyri, at Súlan ikki tekur alt fólkið, sum ætlar sær til Mykinesar um summarið, og tí trupulleikanum kann sleppast undan við størri skipi.